# NunaMinerals til verka

Grønlendska ráevnisfelagið NunaMinerals ætlar sær at brúka 24 milliónir krónur til leiting í hesum árinum. Arbeiðið er byrjað við Gieseckes-vatnið norðan fyri Syðra Streymfjørðin, har felagið leitar eftir kopari og nikkel. Økið er partur av einum leitiloyvi, sum umfatar 337 ferkilometrar. Herumframt hevur felagið loyvi at leita í einum 149 ferkilometrar stórum øki í Eysturgrønlandi, har leiting hevur avdúkað nikkel fyrr.



*NunaMinerals væntar at finna nikkel og kopar við Gieseckes-vatnið (Mynd: Sermitsiaq)*

# Takkaði póllendingum

Á vitjan síni í Póllandi nú um dagarnar nýtti danski forsætisráðharin, Anders Fogh Rasmussen, høvi til at takka teimum nógvu póllendingunum, sum arbeiða í Danmark. Forsætisráðharrin segði, at póllendingarnir gera stórt gagn, tí Danmark hevur tørv á arbeiðsmegi. Hann segði seg skilja, at hetta kann gera, at trot er á arbeiðsmegi í Póllandi ístaðin fyri, men hann helt, at Pólland kann fáa gagn av royndunum hjá teimum, sum arbeiða í Danmark.

Hann arbeiddi í fiski á tí gamla virkinum, sum tá kallaðist fyri Lynfrost. Og hann heldur fram á sama staði, nú tað eitur Fiskavirking í Runavík.

Her hevur verið nógv arbeiði, men fyrrapartin henda týsdagin visti hann ikki, hvussu leingi teir fóru at arbeiða út á seinnapartin.

Teir landaðu fyrst Jaspis, og skuldu so fara undir at landa Ametyst beinanvegin aftaná.

- Eg veit ikki, tað verður kanska til klokkan 4 ella 5 í dag, sigur Tórleif.

### Okkurt skal man gera

Eftir at hava arbeitt mong ár her á virkinum undir skiftandi eigarum, telist Tórleif millum tey royndu á virkinum.

- Mær dámar í øllum førum væl at arbeiða her. Her er fínt at vera, sigur hann, og leggur síðani aftrat:

- Tú veit: Okkurt skal man gera .... fyri at liva!

Vanliga er hann ein av landarunum, og tað dámar honum væl. Men tá eingin bátur er at landa, arbeiðir hann ístaðin inni á virkinum.

Sjálvur dugir hann ikki at siga, hvat arbeiði er tað betra. At arbeiða inni og at arbeiða úti, hava bæði sína fyrimunir og sínar vansar.

- At landa eitt skip ein slíkan góðveðursdag sum í dag, tað er fínasta slag.

- Men at standa soleiðis og landa í illveðri og kavaroki, - noy, tað er ikki altíð so stuttligt, sigur hann við einum brosi.



*Tað er eitt gott samstarv og gott lag millum menninar í landingini. – Hetta er eitt gott arbeiði, sigur Tórleif Nielsen*

**Týsmorgunin komu Jaspis og Ametyst inn at landa til Fiskavirking í Runavík.**

**Tá landingin var liðug vísti tað seg, at veiðan samanlagt var um 240.000 pund.**

**Av skrivstovuni á virkinum verður upplýst, at meginparturin av veiðuni henda túrin var hýsa.**

**sb.**

*»Eg haldi sjálvur, at ein eigur at vera varin við at flyta alt ov nógv fólk inn til landið ísenn«*

*»Tú veit: Okkurt skal man gera .... fyri at liva«*

# Mugu vera varin

**Seinastu tíðina eru komnar ymiskar fráboðanir um arbeiðið í fiskivinnuni.**

**Onkur sigur, at tað er trupult at útvega arbeiðsmegi til øll virkini, og at ein tí er noyddur at fáa útlendingar til hetta.**

**Samstundis verður sagt frá, at ein helst eigur at minka um talið á fólki í fiskivinnuni, soleiðis at landsbúskapurin ikki verður so bundin at gongdini og sveiggjunum í fiskivinnuni í framtíðini.**

**Hjá einum manni sum Tórleif, ið ikki hevur nakran bókligan lærdóm at hella seg afturá, er fiskivinnan á sjógvi og serliga á landi grundarlag hansara.**

**- Tey siga øll so ymiskt. Onkur sigur eitt, og dagin eftir kemur ein og sigur nakað annað. Men eg haldi sjálvur, at ein eigur at vera varin við at flyta alt ov nógv fólk inn til landið ísenn.**

**- Tað kann so skjótt taka yvirhond, sigur Tórleif Nielsen, landari á Fiskavirking í Runavík.**